# Eyðun og Terji aftur á pallin

**Tað verður ein endaleys røð av kendum sangum á skránni, tá ið Eyðun & Terji spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tveir av bestu poppsangarunum í Føroyum fara leygarkvøldið at spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen hava skrivað, sungið og spælt eina langa røð av hittum í føroyskum tónleiki, og allar hesar sangir taka teir við sær á pallin í Fuglafirði leygarkvøldið.

Hetta er fyrstu ferð síðani august mánað í fjør, at Eyðun & Terji spæla saman alment. Tá spældu teir á Summar Festivalinum í Klaksvík, og framførslan eydnaðist framúr væl.

Og tað er kanska ikki so løgið hóast alt, at Eyðun og Terji eru førir fyri at fáa fólk við sær, sum teir vanliga gera.

Báðir hava spælt live í nógv ár, teir hava spælt við nøkrum av best umtóktu bólkum í landinum, og so hava teir eina ørgrynnu av kendum sangum at taka av. Hvør kennir ikki sangir sum Eros, Dansa, Nummar, Flýggi til tónleikin, 80'ini og aðrar. Hetta er nakað av tí besta í føroyska poppsangskattinum, og Eyðun og Terji hava verið við til at spæla og skriva hesar sangir.

### Eitt rimmar tiltak

Leygarkvøldið fara teir at tríva í allar sínar kendu sangir, sum teir hava spælt saman við Føstufressum, Moirae, Frændum, og sum teir hava spælt í felag á fløgu og konsertum.

Eyðun og Terji vóru fyri nøkrum árum síðani rættiliga virknir í einum samstarvi, sum eisini hevði við sær eina fløguútgávu við nýggjum sangum.

Seinnu árini hevur hetta samstarv ikki verið so stórt, sum tað onkuntíð var, men teir spæla av og á saman. Og leygarkvøldið verður ein møguleiki at hoyra teir aftur.

Bólkurin hjá teimum er mannaður soleiðis: Leivur Thomsen (gittar), Rógvi á Rógvu (trummur); Arnold Ludvig (bass) og Magnus Johannesen (ljómborð).

Og samantvinnar tú nakrar av bestu tónleikarunum í landinum við teir báðar tiltiknu poppkomponistarnarar og sangararnar, so fært tú eitt rimmar tónleikaupplivilsi.

Bussar koyra í sambandi við tiltakið leygarkvøldið, og sum nakað nýtt koyra bussar eisini úr Klaksvík, so nú hava klaksvíkingar møguleikan at verða við. Bussar koyra eisini úr Eysturoynni, Havn og Vágum.



*Eyðun & Terji fara leygarkvøldið at spæla til dans í Fuglafirði*

# Ein móttøka, sum vil nakað

**Talan verður um bæði nýtt og gamalt, tá Føroyaprent fríggjadagin heldur móttøku. Ein móttøka, sum sambært stjóranum hevur fleiri endamál**

MÓTTØKA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Framsýning av fyrstu bókunum, sum vóru prentaðar í Føroyum. Framsýning av nýggjum bókum. Prent av litplakatum, sum verða lætnar teimum vitjandi, ið eisini kunnu fáa tvey yrkingarsøvn við á vegnum. Og so sjálvandi eisini livandi tónleikur, har ein av fólkakærastu sangarum okkara fer at framføra yrkingar hjá einum av fólkakærastu yrkjarum okkara.

Jú, har verður gjørt nógv burturúr, nú Føroyaprent fríggjadagin skipar fyri móttøkku. Ein móttøka, sum kanska fyrst og fremst skal markera, at samanleggingin av Hestprent og bókaprentinum hjá Dimmalætting nú er líka sum komin á mál. Men samstundis ein móttøka, sum eisini markerar so nógv annað.

### Frambrot og sjónliggerð

Jon Hestoy, sum var einsamallur eigari av Hestprent, og sum nú er stjóri á Føroyaprent, sigur, at tað hjá teimum eru fleiri góðar orsøkir til hesa móttøkuna.

– Eitt tað týdningarmesta hjá okkum at sýna fram á móttøkuni, er nýggja UV-lakkmaskinan, sum vit hava gjørt íløgu í. Fyri uttanfyristandandi ljóðar hetta kanska ikki av so nógvum, men fyri prentmøguleikar her í Føroyum er hetta mest sum ein kollvelting. Hetta ger, at vit kunnu prenta eins glitrandi pappír, sum tú sært á mongu útlendsku magasinunum, sum tú fært ymsastaðni. Tað er nakað, sum ongantíð áður er gjørt í Føroyum, og tí gevur hetta okkum heilt aðrar møguleikar at fara eftir arbeiðum, sum áður hava verið send til Danmarkar at gera.

– Men hartil, so markerar móttøkan eisini so nógv annað. Síðani vit í 2004 løgdu saman, hava bæði vit og kundar okkara liva í einum ævigum byggiróti. Nú eru hølini her við Hoyvíksvegin mest sum komin heilt upp á pláss, og í aðrar mátar er virkið líðugt umskipað, og hetta er nakað, sum vit fegin vilja vísa bæði kundum og øðrum. Ofta vita hesi heldur ikki, hvat tað er fyri ein fyritøka, sum tey hava við at gera. Vit eru errin av, at vit hava eina somikið góða prentsmiðju, sum vit hava, og ofta verða viðskiftafólkini bilsin, tá tey síggja, hvussu stórt virkið í veruleikanum er.



*Jon Hestoy og starvsfólk hansara á Føroyaprent hava úr at gera, nú seinastu fyrireikingarnar til móttøkuna skulu fáast upp á pláss* *Mynd: Jens Kristian Vang*

### Vilja síggjast aftur

Júst hetta við sjónliggerðini er eisini nakað, sum kanska hevur verið ein trupulleiki hjá Føroyaprent. Og hetta er eisini ein av orsøkunum til, at somikið nógv verður gjørt burturúr móttøkuni.

– Samanleggingin og konsernviðurskiftini við Dimmalætting hava kanska viðført, at fólk onkra tíð hava ivast, hvat fyritøka okkara í veruleikanum er. Eru vit partur av Dimmalætting ella Prentmiðstøðini, ella gera vit kanska avísir, og hvat er sambandið við Sosialin? Hetta ger tað eitt sindur trupult hjá okkum at positionera okkum mótvegis marknaðinum, og eisini tað er nakað, sum vit vilja broyta.

– Og tað er heldur ikki av tilvild, at móttøkan er sett soleiðis saman, sum hon er. Við teimum báðum framsýningunum sýna vit, at virkið hevur djúpar røtur aftureftir, samstundis sum vit eru ein nýmótans prentsmiðja. Styrki okkara hevur serliga verið bókaprent og 4-farvu litprent, og tí nýta vit eisini høvi at gera plakatina og at endurprenta yrkingar hjá Tummas Napoleon Djurhuus. Tongla-Tummas, sum hann eisini varð nevndur, hevur altíð verið ein av mínum persónligu favorittum, og við teimum báðum bókunum, sum verða prentaðar, fáa vit tvær púrasta ymiskar síður av honum. Og við Hanus Johansen sleppa gestirnir eisini at uppliva framførslu av nøkrum av tí, sum er at finna í bókini.

Móttøkan hjá Føroyaprent verður 5. mai klokkan 15.

## Yvirskot eftir einum ári

Tað var ein hampuliga errin stjóri, sum fyri stuttum legði fram ársroknskapin fyri 2005 hjá Føroyaprent.

Hóast yvirskotið á 167 tkr. kann tykjast heldur lítillátið fyri eitt virki av hesari stødd, so er hetta eitt úrslit, sum leiðslan metir sum sera nøktandi.

– Vit hava jú framt stórar broytingar, síðani Hesprent og bókaprentið hjá Dimmalætting varð lagt saman. Bæði tá tosað verður um framleiðslu, starvsfólk, tólbúnað og hølisumstøður. Og tí var væntandi, at tað kundi taka nakað av tíð at fáa raksturin aftur á beint. Men tað hava vit so fingið longu næsta árið, og tað eru vit framúr væl nøgd við, sigur Jon Hestoy, stjóri.

Fíggjarstøðan hjá felagnum javnvigaði tann 1. januar við 21.494 tkr. Eginognin var tað7.108 tkr.

**-mørk**